## Festivalfundur útsettur



Fráboðaði tíðindafundurin hjá stigtakarunum av fyribilskallaða Føroya Festivalinum í Kirkjubø er fyribils útsettur. Sum Sosialurin skrivaði í gjár, er ætlanin at skipa fyri festivali í Kirkjubø í døgunum 16.-18. juli næsta ár. Millum stigtakararnar eru Mark Joensen, James Olsen og Fróði Vestergaard. Í innbjóðingini til tíðindafundin mánadagin, sum nú altso er útsettur, stóð, at ætlanin er at borðreiða við nøkrum av tí besta tónleikarliga, sum finst í Føroyum, eins og kend útlendsk nøvn vera á skránni. Harafturat verður skipað fyri undirhaldi til bæði børn og aðrar aldursbólkar.

## Opið bræv frá Haarde

»Versta fíggjarkreppa í mong áratíggju fer nú um heimin og lítast má langt aftur í søguna til at finna samsvarandi tilburðir.« Soleiðis byrjar íslendski forsætisráðharrin, Geir H. Haarde, eitt opið bræv til føroyingar. Víðari skrivar hann: »Lánveiting frá altjóða stovnum og vinartjóðum ger tað møguligt hjá okkum at fara undir endurreisingararbeiðið og veldur, at vit koma skjótari uppundanaftur. Umframt Altjóða Gjaldoyrisgrunnin, har Ísland hevur verið limur síðani 1946, ætla Føroyar, Pólland, Noreg, Danmørk, Finnland, Svøríki og Russland at læna Íslandi pening, og harafturat er hugsandi, at Evropiska Samveldið (ES) fer at taka lut í hesum felagsátakinum hjá omanfyrinevndu pørtum«. Mánadagin prenta vit alt brævið hjá íslendska forsætisráðharranum.

# Tað endaði við rundkoyring



*Nú er endaliga samtykt, at rundkoyring verður á hesum krossinum, Hvítanesvegur-Eystari Ringvegur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Málið um at fáa skipað ferðsluviðurskifti við krossin Hvítanesvegur-Eystari Ringvegur, endaði á býráðsfundi í gjárkvøldið við, at rundkoyring varð samtykt – av andstøðuni saman við Leivi Hansen**

FERÐSLUTRYGD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Spurningurin um, hvussu ferðslu trupulleikarnir við krossin Hvítanesvegur-Eystari Ringvegur skal loysast, hevur hevur fingið drúgva og langa viðgerð, var endaliga avgreiddur á býráðsfundi í Tórshavnar kommunu í gjárkvøldið.

Upprunaliga ætlanin var, at ein rundkoyring skuldi loysa trupulleikan, men mitt í viðgerðini – og eftir, at arbeiðið varð boðið út og tilboð góðtikið – kom Tekniska nevnd eftir, at betri var at gera ljóskurvar á krossinum, eisini vísandi til minni kostnaðin, ið stóðst av.

Men ein meiriluti í Teknisku nevnd metti kortini, at rundkoyringin var betra loysnin, og mælti hesin meiriluti, ið var Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen úr andstøðuni saman við Leivi Hansen úr samgonguni til, at hildið var fast við upprunaætlanina um eina rundkoyring.

Málið var so fyri til endaliga viðgerð í gjárkvøldið, og eftir at uppskotið hjá samgonguni fall, varð uppskotið hjá meirilutanum í Teknisku nevnd samtykt við sjey atkvøðum fyri og fýra ímóti.

Fyri atkvøddu Leivur Hansen, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir og Marin Kathrina Frýdal.

Elin Lindenskov og Halla Samuelsen atkvøddu ikki.

Sostatt kann Sp/f Andrias Berg nú far undir arbeiðið at gera rundkoyring á 30 diametrar á krossinum Hvítanesvegur-Eystari Ringvegur.

# Fíggjarlógin einmælt samtykt

**Fyri fyrstu ferð hetta valskeiðið var einki broytingaruppskot, og tí var fíggjarlógar uppskotið einmælt samtykt á býráðsfundi hjá Tórshavnar kommunu í gjárkvøldið**

FÍGGJARLÓG
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Fíggjarlógin hjá Tórshavnar Býráð fyri komandi ár, varð endaliga samtykt á býráðsfundi í gjárkvøldið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

11. september legði býráðið í Havn fram uppskot til fíggjarlóg fyri komandi ár, eitt uppskot, ið javnvigaði við 617.692 milliónum krónum.

Eftir at ymsu nevndirnar høvdu viðgjørt tørv og ynski fyri 2009, varð eitt broytt uppskot lagt fram til fyrstu viðgerð, sum var 39.200 milliónir hægri, og javnvigaði við 656.892 milliónum. Og tað var hetta uppskot, sum varð endaliga samtykt við aðru viðgerð í býráðnum í gjárkvøldið – einmælt.

Talan er kortini um eina munandi lækking í fíggjarætlanini í mun til í ár, tá fíggjarlógin javnvigaði við 742.449 milliónum krónum. Størsta broytingin er íløgukarmurin, sum er lækkaður úr 256.800 milliónum í 2008 niður í 149.200 milliónir krónur fyri komandi ár.

Nógv størsti rakstrarposturin á fíggjarætlanini er barnaansingin, sum fer avstað við138.966 milliónum krónum. Men tá er vert at minnast til, at talan er um heilar 31 ansingarstovnar og frítíðarskúlar í kommununi.

Nógv størsti parturin av játtanini fer til »Barna- og ungdómsdeildina (24.170 milliónir)« og til »Sjálvsognarstovnar o.a. (14.348)«.

Hinir postarnir eru mest sum teir somu.

### Mest í skúlar

Hinir útreiðslupostarnir hækka við millum tveimum og trimum milliónum í meðal, tó minka teknisku veitingarnar eitt lítið vet.

Tilsamans hækka rakstrarútreiðslurnar við umleið 14 milliónum, úr 484.649 milliónum krónum í 2008 upp í 498.506 milliónir næsta ár.

Hendan hækkingin á 14 milliónir í rakstrarútreiðslum skal so eisini haldast upp ímóti einari væntaðari øktari inntøku á smáar 15 milliónir krónur.

Í fíggjarlógini fyri í ár skuldu 152.449 milliónir krónur fíggjast við »tøkum peningi«, sum tað eitur, antin tað so er innistandandi ella lántøka, meðan hetta talið fyri komandi ár er 52.096 milliónir.

Sum nevnt eru íløgurnar minkaðar við góðum 100 milliónum krónum niður í 149.200 milliónir, og nógv størsti posturin er í skúlabygging – tað eru skúlarnir við Løgmannabreyt og á Hamrinum á Argjum – 87 milliónir krónur.

Posturin »Ítróttur og frítíðarvirksemi« fær 29.500 milliónir krónur, og helst man størsti parturin av hesari upphædd vera markað til fimleikahøllina við Tórsvøll.

Hildið verður fram við at uppgradera kloakkirnar í kommununi, so tær lúka øll krøv, tá kunngerðin um kommunalar kloakkskipanir verður sett í gildi ein av fyrstu døgunum.

Restin av íløgunum eru smærri upphæddir. Fimm milliónir til Glyvursvegin, 1.-4. stig, og aðrar fimm milliónir til eldraøkið, helst fer ein partur av hesum til forarbeiðið av eldradepli yviri við Strond.